# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Rúna millum vinir



*Mentamálaráðharrin og systkinabarnið hjá Rúnu var eisini komin í føðingardag og spældi sum vera man undir til nógvu sangirnar*

**Týsdagin 11. oktober fylti Rúna Sivertsen 50 ár. Dagurin varð hildin á Klaksvíkar Sjómansheimi, har væl yvir hundrað gestir úr øllum heraðshornum vóru komin at ynskja tillukku**

FØÐINGARDAGUR

Rúna Sivertsen má sigast at vera ein dáma við nógvum jørnum í eldinum. Og óvanliga fjølbroytti skarin, sum var komin at ynskja henni tillukku við 50 ára føðingardegnum, var besta prógv um, hvussu ymisk áhugamálini hjá Rúnu eru. Sangarar úr Betestakórinum settu sín vakra dám á sangin, meðan Mentamálaráðharrin og systkinabarnið hjá Rúnu, Jógvan á Lakjuni, spældi undir. Millum vinir og familju vóru eisini fleiri aðrir politikarar at síggja, umframt limir í Ráðnum fyri Ferðslutrygd og ikki so fá úr blaðheiminum, har Rúna hevur havt sín penn við í leikinum seinastu árini.

Ein av teimum, sum nýtti høvið at siga nøkur orð, var rithøvundurin og blaðmaðurin Justinus Eidesgaard. Rúna hevur onkuntíð givið Justinus "skyldina" fyri, at hon av álvara fór uppí blaðarbeiði, tí tað var hann, sum tók telefonina, tá Rúna fyrstu ferð ringdi til Sosialin fyri at vita, um brúk var fyri freelancefólki.

- Justinus var mín fyrsti tíðindaleiðari og hevur mangan verið góður í ráðum. Men tað skal sigast, at øll á Sosialinum fingu meg at kenna meg so væl í blaðumhvørvinum, at eg fekk hug at halda fram, sigur Rúna, sum tískil er farin í holt við at útbúgva seg til journalist.

Rúna var sera glað og ovfarin av, at so nógv høvdu sett eina løtu av hetta týskvøldið, tí sum hon sigur

- 50 ár er jú ikki ein so serliga stórur føðingardagur, og fólk hava so nógv annað at brúka tíðina til. Men eg valdi at halda dagin, tí eg helt hvørki 40 ára føðingardag ella silvurbrúdleyp. So tað fjálgaði veruliga at síggja so nógv av mínum vinum, familju, starvsfeløgum, ja tey øll hesa løtuna.

**- ave -**



*10 ára gamla dóttir Rúnu, Birgit, sang føðingardagssang fyri mammu síni saman við vinkonunum Rakul og Victoriu*



*Fyrsti tíðindaleiðarin hjá Rúnu, ritøvundurin og blaðmaðurin Justinus Eidesgaard, var eisini komin at ynskja tillukku við teimum 50 árunum*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Edit Joensen, Klaksvík**, andaðist á Norðoya Røktarheimi týsdagin 11. oktober, 68 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Dania Luid, ættað úr Hovi og búsitandi í Havn**, andaðist á Lágargarði 10. oktober, 80 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Lena Johannesen, Oyndarfjørður**, andaðist í heiminum 10. oktober, 82 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Oyndafjarðar kirkju fríggjadagin klokkan 13. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Lenu kunnu lata Oyndafjarðar kirkju eina gávu.

**Elsebeth Arge av Argjum** vanliga nevnd Ebba, andaðist mánadagin, 94 ára gomul. Jarðarferðin var úr Argja kirkju hósdagin klokkan 13.

**Poul Hammer úr Hovi** andaðist á Landssjúkrahúsinum mánadagin 10. oktober, 66 ára gamal. Bønarhald verður í kapellinum hósdagin 13. oktober klokkan 17. Jarðarferðin verður úr Hovs kirkju fríggjadagin 14. oktober klokkan 13. Tey, ið ynskja at senda blómur ella krans, kunnu í staðin lata eina peningagávu til Missiónshúsið í Hovi.

**Jógvan Julius Joensen, ættaður úr Fuglafirði, búsitandi í Gilleleje**, andaðist sunnudagin, 95 ára gamal. Jarðarferðin verður fríggjadagin kl. 13 úr kirkjuni Bygade 26, Søborg, 3250 Gilleleje.

*Almenn móttøka*

Í sambandi við at Tryggvi Johansen leggur frá sær og Herálvur Joensen tekur við starvinum sum nýggjur sendimaður, verður boðið til móttøku á Norðurbryggjuni í Keypmannahavn **hósdagin 13. oktober 2005 frá kl. 16.30** har løgmaður Jóannes Eidesgaard er vertur.

*Øll eru vælkomin.*